## Aud í Soylu

(9)

**Fra:** Pál Weihe
**Sendt:** fríggjadagur 25 januar 2019 11:00
**Til:** Kristianna Larsen á Lofti
**Cc:** Elinborg Mortensen; Fróði Joensen (lsfrojo@ls.fo); Jóna Hansen; Kasper Kyhl; Marjus Dam (marjusdam@gmail.com); Pál Weihe; Turið Holm Johannesen (turidhj@gmail.com)
**Emne:** RE: Uppskot til løgtingslóg um virksemi á rúsdrekka- og rúsevnaviðgerðarstovnum - til hoyringar

Til
Heilsu- og innlendismálaráðið,

Hoyringssvar frá Læknafelag Føroya um uppskot til løgtingslóg um virksemi á rúsdrekka- og rúsevnaviðgerðarstovnum.

Læknafealg Føroya viðgjørdi uppskotið á nevndarfundi tann 18. januar 2018 og kom til hesa niðurstøðu:

Nevndin tekur sum heild undir við uppskotinum, tó skulu vit siga, at tað er týdningarmikið, at Heilsutrygd, sum skal góðkenna ein viðgerðarstovn, hevur teir neyðugu førleikarnar, og vit halda, at tað eigur at verða skrivað inn í lógina, at Heilsutrygd skal spyrja t.d. tann nýggja Fólkaheilsumyndugleikan, har fólk við læknafrøðiligum kunnleika fara at sita, um góðskumetingar av stovnunum.
Annað er, at tað í lógini stendur, at teir læknar, sum skulu síggja sjúklingin við innskriving, skulu vera serlæknar og ikki læknar undir útbúgving t.d. turnuslæknar. Her skal sigast, at hugtakið "turnuslækni" ikki finnist longur. Nóg mikið er at siga, at tað skal vera ein serlækni, sum visiterar. Nevndin skal eisini loyva sær at føra fram tað sjónarmið, at læknin eigur at gera eina vanliga medisinska innskrivingarmeting og skriva eina journal svarandi til tað, sum hann hevur funnið við diagnosum, flokka eftir ICD1 soleiðis, sum læknalógin ásetir, at ein lækni skal gera. Ikki nóg mikið við tí, men vit halda eisini, at tað eigur at vera ein útskrivingarsamrøða, har útskrivingardiagnosan er staðfest. Læknarnir eiga at hava eina vanliga medisinska journalføring soleiðis, at tað við árslok ber til at gera útgreinað hagtøl. Tey skulu gerast av teimum læknum, sum hava staðið fyri medisinsku ábyrgdini, og tað skal eisini verða møguligt at síggja, hvussu nógv fólk ganga aftur og ikki bert talið av einstaklingum, ið hava verið ígjøgnum skipanina.

Vegna Læknafelag Føroya
Pál Weihe, formaður

**From:** Kristianna Larsen á Lofti <Kristianna.Lofti@himr.fo>
**Sent:** týsdagur, 15. januar 2019 16:28
**To:** 'blakross@blakross.fo' <blakross@blakross.fo>; martin@frelsunarherurin.fo; 'heilbrigdi@heilbrigdi.fo' <heilbrigdi@heilbrigdi.fo>; Heilsutrygd <heilsutrygd@heilsutrygd.fo>; Egil á Bø <eab@heilsutrygd.fo>; info@sjukrarokt.fo; Pál Weihe <pal@health.fo>; Fróði Joensen <frojo@ls.fo>; J. Andreas Thomsen - Felagið yngri læknar <jandreasthomsen@gmail.com>; marjusdam@gmail.com; m-dam@olivant.fo; ls@ls.fo; Ella Larsen <ellla@ls.fo>; Klaksvíkar Sjúkrahús <ks@ks.fo>; Heri Ellingsgaard <heri@ks.fo>; Suðuroyar Sjúkrahús <ssh@ssh.fo>; Ronnie Midjord <ronnie@ssh.fo>; Føroyskir Sálarfrøðingar <mail@psykolog.fo>; Fólkaheilsuráðið <fhr@folkaheilsa.fo>; Magni Mohr <MagniM@setur.fo>; djo@olivant.fo
**Cc:** Jan Simonsen <Jan.Simonsen@himr.fo>; Guðrun Maria Mortensen <Gudrunmm@himr.fo>; Aud í Soylu <Aud.Soylu@himr.fo>
**Subject:** Uppskot til løgtingslóg um virksemi á rúsdrekka- og rúsevnaviðgerðarstovnum - til hoyringar

**Til avvarðandi myndugleikar/hoyringspartnarar**

Hjálagt verður sent til hoyringar:

- **Uppskot til løgtingslóg um virksemi á rúsdrekka- og rúsevnaviðgerðarstovnum**

Heilsu- og innlendismálaráðið sendir nevnda lógaruppskot til hoyringar við freist at senda inn viðmerkingar **friggjadagin 25. januar 2019 kl. 12:00**

Viðmerkingarnar skulu sendast til Heilsu- og innlendismálaráðið á t-post **himr@himr.fo** ella til Guðrun Maria Mortensen, fulltrúa, á t-post **gudrunmm@himr.fo**

Sí eisini hjálagda hoyringsskriv, sum er krókt í fílu.

Vegna Heilsu- og innlendismálaráðið

Guðrun Maria Mortensen
Fulltrúi, Advisor

HEILSU- OG INNLENDISMÁLARÁÐIÐ
Eirargarður 2 • 100 Tórshavn
Tel. +298 304050 • Mobile +298 734026
gudrunmm@himr.fo • www.himr.fo